sum vørurnar mega verða seldar fyri.

§ 3.

Brot móti hesum fyriskipanum ella teim reglum, ið verða ásettar við heimild í teimum, verða revsað við sekt, ið fellur til amtsgrunnin, ella við hefti. Harumframt verða vørur, sum ólógliga verða innfluttar, konfiskeraðar og falla til landshandilin.

§ 4.

Mál viðvíkjandi brot móti hesum reglum ella fyriskipanum, ásettum við heimild í teimum, verða viðgjørd sum almenn politimál.

§ 5.

Hesar fyriskipanir koma í gildi beinan vegin.

I aðra syftu (tfall hitt fyrsta fellur):

(Hetta uppskot vildi lækka prisirnar beinavegin við 11%)

C: Bráðfeingis fyriskipanir fyri Føroyar um prisir, arbeiðslønir o. a.

§ 1.

Tá vøruprisir verða ásettir á vørur frá útlandinum, má ágóðin ongantíð verða meiri enn niðanfyri nevnda procenttillegg til varanna fobpris ella fyri smáselumenn til varanna kostpris:

Vørudeild	Provisionsagentur	Importagentur	Grossistur	Detailistur, id keypir frá antin grossisti ella importagenti	Detailistur, id sjálvur innflytur vørur beinleiðis
Matvørur	2	5	6	25	30
Manufakturv.	3	5	8	25	30
Skófeinaður	3	5	8	25	30
Forðsar bruksvørur, alt slag av glas- postalintajáncu og leirvørur		6	8	25	33⅓
Tól, jarn- isenkram o. a. metalvørur og maskinur		5	8	25	33⅓
Óvunnið timbur og byggitiltar		8	10	25	30
Skipautgerð, fiskireiðskap o. t.		8	10	25	30

Provisiónsagentur er ein agentur, ið selur vørurnar uttan at leggja tær á goymslu. Importagentur er agentur, ið ræður yvir goymslurúmum, har vørurnar vanliga verða goymdar.

Allar fakturair skulu uppgeva fobprisin, annars hevur prisansingarráðið heimild at rokna fobprisin av tí uppgivna fakturaprisinum við einum av ráðnum ásettum hóskandi frádrátti.

§ 2.

Tað er ikki loyviligt fyri grossist, ið flytir vørur til Føroyar at selja tær til annan grossist, men bert beinleiðis til detailhandlandi, ið ikki má selja tær til aðrar handlandi, men bert beinleiðis til forbrúkara.

§ 3.

Handverkarar skulu hava skyldu at skriva rokning fyri gjørt arbeiði og specificera rokningina, so prisurin fyri brúkt tilfar, roknað tímatal fyri hvønn einstakan arbeiðara (harundir meistarin sjálvan) og tann nýtta tíðin sæst av rokningini. Prisansingarráðið ásetur, hvarvitt handverkarin umframt tímalønina fyri gjørt arbeiði, hevur loyvi at rokna serstakt endurgjald fyri útreiðslur til verkstað, tól o. a., sum vissan procent av tí útroknaðu handverkaralønini ella á annan hátt.

§ 4.

Hesar fyriskipanir koma í gildi beinan vegin.

— — —

C. Landsnevndin verður heimilað tingsins vegna at veita stuðning til at halda móti prísvøkstri ella niðursetan av prísum á neyðsynjarvørum eins og til tingsins vegna at gera mótrøkulógir til hetta endamál.

D. Tingið velur eina 5-mannanevnd til samráðingar við Bretar um lækkan av farmagjaldinum og til umskipan av handlinum við Brettland sambært tað í álitinum framflutta.

ÍSLANDSTÍÐINDI

Hin 16. februar varð hægstiréttur Islands heiðraður vegna 25-ára dagin. Hægstarættar-løgfrøðingar flýddu honum gávu, 10,000 kr. til bókakeyps. Dómsmálaráðharrin segði frá at dómarar skuldu økjast. Frá at vera 3, sum teir hava verið nú í mong ár, skula teir hereftir verða 5, sum teir, eftir rættarskipanini, eiga at vera.

Kavin var so nógvur í vetur at stórir rutubilar kavaðu undir á leiðini og fólkið mátti søkja sær skjól í fjallasmáttum. Bilarnir stóðu í vikuvís, áður enn teir fingust út aftur grivnir. Traktorar drógu somikið av mjólk oman úr »Sveit« at sjuklingar og børn kundu bjargast.

Eplatrot er í Islandi. Kemur hetta av at nógv spilla var í eplunum í summar, og haraftrat eru nógv epli farin av frosti í vetur.

Gitnasti málari Islands, Jóhannes Kjarval helt framsýning av 40 málningum í byrjan av febr. Dýrasta málarverkið kostaði 24 túsund kr. Alt var selt á løkum klokkutíma. Umleið eina hálva millión kostaði alt tilsamans. Altingið hevur viðtikið at veita 300,000 kr. til at reisa honum heiðursbústað og sýningarhøll fyri. Ætlanin er, at høllin skal verða liðug til 60-ára føðingardag hansara í heyst.

Altingið hevur skipað nevnd, ið skal kanna eftir hvat ið sparast kann í rikisforsetuni (administrasjón).

Islendskur sjómaður datt niður imillum skipini, á náttartíð. Manningin á »Normanner« (Gásadalsmenn) bjargaði honum. Hetta heppna bragd stóð umtalað í blaðunum og kom eisini í Útvarpið, men tiverri var skipanavnið ikki rætt, tí har var sagt, at tað var manningin á ísl.-bátinum »Fjølni«.

Tað er nú eydnast at fáa útfluttningsloyvi í Sveriki fyri 55 fiskibátum áttrat og eru bátarnir nú 100, ið koma skulu. Haraftrat hevur rikisstýrið nú viðtikið, at smíðast skula 50 bátar heima, so skjótt sum til ber. Hesir bátar ætlast at koma at kosta umleið 7500 kr. hv. tons. Keyparar kunna fáa 3000 kr. hv. tons í láni til 1. veðrætt og haraftrat upp til 100.000 kr. í hjálparlán til hvønn bát. Hjálparlánið verður rentufrítt.

24 juni komandi skal rikisforseti veljast. Tað er ivaleyst, at Svein Bjørnson verður sjálvvaldur. Sjálvstøðisflokkurin, Framsóknarflokkurin og Alþýðuflokkurin eru komnir á samt um at styðja hann til val, um hann annars gevur seg til. Sósialistaflokkurin hevur viðtikið, ikki at stilla upp móti honum.

Náttina til 24. mars brast hann á við ódnarveðri, so at flestu bátar máttu rýma frá hunnum. Tó leitað hevur verið, er lítið afturfunnið. Hetta var stórur skaði, tí trot er uppá línur í landinum. Missurin er mettur til 200,000 kr.

Útróðrarveðrið hevur verið ólagaligt, tí hevur stórur floti av skipum ligið og biða upp á last. Fiskurin er annars nógvur í ár.

Í VÁGSBOTNI
fæst:

GÓLVKUSTAR
HONDKUSTAR
GØTUKUSTAR
SKÚRIBUSTIR
ZINKBUSTIR
NAGLABUSTIR
OVNBUSTIR
SKÓBUSTIR
PÁSMYRJINGSBUSTIR
KLÆDNABUSTIR
KÁLKKUSTAR
MÁLARAPENSLAR
(flatir & rundir)
TJØRUKUSTAR
KUSTASKØFT
DURA-GLIT METAL-POLISH.
frálíkt pussi-evni

TAKPAPP:

nr. 1 45/- rl
- 2 35/- -
- 3 25/- -

(pappseymur fæst tilsvarandi)

Z. Heinesen
tlf. 83 tlf. 240

Lýsing.

Til fólkaskúlan í Klakksvík søkist ein vikarur, ið fyriuttan í almennum lærugreinum eisini kann undirvísa í fimleikt fyri dreingir, til 1. mai 1945.

Umsóknir við neyðturviligum pappirum biðjast sendar til skulakommissiónina fyri Klakksvíkar sókn áðrenn 25. apríl.

Skúlakommissiónin fyri Klakksvíkar sókn, 14. apríl 1945.

Nakrir dreingir,

ið hava hug til jarðabrúk, kunnu fáa pláss sum næmingar á reyndarbrúkinum í Hoyvík 1. juni í ár

Matvørur

og aðrar húsarhaldsvørur hjá

Karl K. Mouritsen.

Tlf. 497. Tórshavn. Tlf. 497

Blanka er besta blankingarevni.

Hjálp til treingjandi børn.

Samsvarandi skipan **Barnahjálpargrunnsins** verða tað í ár býttir út studningar til treingjandi førovsk børn.

Umsóknir um studning mugu vera nevndini í hendi **seinast hin 30. mai í ár** og skrivaðar á serlig útfyllingarblað, ið fáast frá kassameistaranum hr. *Jens Chr. Christiansen*, Tórshavn, ella við umbøn stílaða til, **Barnahjálpargrunnin, Tórshavn**

Somuleiðis verða fólk, ið hava hug at beina nevndini á børn, sum treingja, og sum møguliga ongan hava fyri seg til at søkja um studning, biðin um innan sama tíðarmark at geva nevndini allar upplýsingar.

Tórshavn, hin 14. apríl 1945.

Nevnd Barnahjálpargrunnsins.